Egga Jensen 65 ár

Hósdagin 22. januar fylti Jógvan Jensen, vanliga nevndur Egga, í Havn 65 ár.

Egga er havnarmaður, sonur Onnu, f. Rasmussen, av Sandi, og Ansgar Jensen, koyrilærara, ættaður úr Sumba.

Egga er útbúgvin lærari, men hann er helst best kendur innan ítróttin. Hann var í mong ár aktivur ítróttarmaður. Umframt at hann í mong ár var við á 1. liði hjá HB í fótbólti, hevur Egga verið aktivur í fleiri øðrum ítróttargreinum. Hann spældi hondbólt við Neistanum, flogbólt við NFL og HB, fimleik og í 1966 varð hann føroyameistari í einmansleiki í borðtennis. Hann var við á føroyska fótbóltslandsliðnum í fleiri ár, og hann hevur eisini verið dómari í bæði í hondbólti og fótbólti.

Síðani hann gavst sum aktivur á hægsta støði, hevur Egga verið virkin á so mongum øðrum økjum í ítróttinum. Í 1980 var hann við til at seta Ítróttarsambandið fyri brekað á stovn. Hann hevur verið formaður har í mong ár.

Egga tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1969. Eftir tað var hann á Danmarks Højskole for Legemsøvelser. Lívsstarvið sum lærari fór hann undir í 1970. Fram til 1978 var hann lærari í Sankta Frans skúla, til hann varð settur í fast starv sum lærari á Føroya Læraraskúla.

Egga er giftur Jónu Højgaard, f. Ellefsen, úr Miðvági, tey eiga børnini Eyðfinn og Ann.

-red

Tórmundur Joensen 80 ár

Fríggjadagin 23. januar fyllir Tórmundur Joensen á Nesi 80 ár.

Tórmundur er ættaður av Hvítanesi. Foreldrini vóru Elisabeth og Dánial Joensen.

Tórmundur fór blaðungur til skips, og alt sítt arbeiðslív var hann sjómaður, inntil hann fyri eini tíggju árum síðan legðist uppi.

Luturin hjá honum var øll síni ár á sjónum at vera kokkur. Tá ið toftamenn í 1976 lótu Mascot byggja, mynstraði Thórmundur við sum kokkur, og har var hann kokkur, inntil hann legðist uppi.

Frammanundan hevði hann siglt við fleiri trolarum, eitt nú Vesturvón og Magnusi Heinason.

Thórmundur giftist í 1951 við Margith, f. Hansen, og ættað úr Gerðinum á Nesi. Tey bygdu sær hús í Flatabø á Nesi og eiga dóttrina Fríðgerð.

Tórmundur er burturstaddur føðingardagin.

-red

http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
Sosialurin
www.sosialurin.fo

†

Mín góði maður, okkara deiligi pápi, verpápi, abbi og langabbi

Hans Jacob Rasmussen
ættaður úr Klaksvík
f. 17. juni 1946

andaðist í Esbjerg tann 22. januar 2009.

Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju týsdagin 27. januar kl.14.

Familjunnar vegna
Ivanda Rasmussen

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara elskaða mamma, omma og vermóður

Helma Poulsen

andaðist á Landssjúkrahúsinum 21. januar, 53 ára gomul.
Bønarhald verður í kapellinum leygardagin kl. 16.00.
Jarðarferðin verður frá Kirkjugarðskapellinum sunnudagin kl 13.00.

Fyri tey avvarðandi
Uni, Bárður, Frígerð, Kristina og Sarita

Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum á ein og annan hátt mintust meg á áttatiára degi mínum.
Somuleiðis vil eg nýta høvið at ynskja familju, vinum og kenningum eitt av Harranum signað nýggjár.

Páll Mikkelsen

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt, sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá faðir okkara

Mourits Sørensen
á Kirkju

andaðist og varð jarðaður.

Familjunnar vegna
Katrin, Sunniva og Pól

Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri

Sverri Trønd Hansen

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri vitjanir, heilsanir og til øll, ið hjálpu til.
Takk fyri blómur og kransar og til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Anna, Heini og Stephania v/ familjum

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Lina Jacobsen
við Gjógvará í Fuglafirði

andaðist og varð jarðað.
Ein serstøk tøkk til Britu á Váli og sangkórið í Siloa fyri sera vakran sang.
Takk fyri peningagávur til Siloa.

Familjunnar vegna
Sámal og Gunnleif